# Sviar tiknir í Teilandi



Myndugleikarnir í teilendska frítíðarstaðnum Pattaya hava tikið tveir sviar og ein breta og skuldsett teir fyri at hava havt kynsligt samband við dreingir, sum eru yngri enn 15 ár. Teir tiknu eru farnir um tey sjeyti, skrivar AP. Teilendska løgreglan sigur, at teir tríggir menninir vórðu tiknir, eftir at løgreglan hevði fingið eina ábending frá norðurlendskari løgreglu, sum eisini visti at siga, at menninir hava fingist við tílíklt virksemi fyrr. Fýra aðrir menn eru tiknir í sama máli, og teirra viðurskifti verða nú kannað. Sambært AP hevur teilendska løgreglan lagt hald á teldur, har menninir høvdu goymt myndir av ungum dreingjum.

# Taliban ræður í stórum økjum

Eitt landakort, sum bretska kringvarpið BBC hevur almannakunngjørt, sigur, at pakistanskir myndugleikar hava ikki ræðið á meiri enn 38 prosentum av útnyrðingspartinum av landinum, meðan Taliban hevur valdið í hinum 62 prosentunum av umráðnum ella meginpartinum av tí. Kortið vísir, at Taliban hevur fult ræði á 24 prosentum av umráðnum og næstan alt valdið í 38 prosentum. Tær seinastu vikurnar hevur pakistanski stjórnarherurin við stuðuli frá amerikanska hervaldinum hert átøkini ímóti Taliban í landspørtunum Swat, Buner og Dir.



*Simon Anholt hevur, hóast dansktklingandi navnið, einki við Danmark at gera. Hann er hálvur onglendingur og hálvur hálendingur, og er fremst serfrøðingurin í heiminum innan kappingarsamleika*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

an mær, tí hetta er veruliga ein gimsteinur. Og her er veruliga talan um eitt land, sum er ein fjaldur gimsteinur, og einasti trupulleikin er, at fólk kenna ikki landið, sigur Simon Anholt.

Og tað er ógvuliga sjáldsamt. Tað er í heilum, at stjórnir seta seg í samband við hann fyri at vita, um hann kann bøta um vánaligt umdømi hjá landinum.

- Tað fyrsta eg tá spyrji um er, um umdømið er vánaligt, tí landið er vánaligt. Og tað verður ofta illa upptikið. Men tá eg so hyggi nærri skilji eg væl, at tey hava vánaligt umdømi, antin tað so er tí tað er eitt keðiligt land, ella tí tey gera alt skeivt. Føroyar hinvegin er eitt út av einari millión, eitt ótrúligt land, sum fólk bara ikki vita um. So her er talan um eitt heilt annað mál, enn um talan var um Afganistan ella Kasakstan, sigur Simon Anholt.

## Samskifti týdning

Tað er sjálvandi munur á at branda Føroyar í mun til eitt land sum Holland, ið jú hevur tulipanir, vindmyllur og eitt fótbóltslandslið í heimsflokki.

- Tú kanst ikki skapa ein kappingarsamleika, hann er har, tú mást bara grava hann fram. Samleikin hjá einum landi finst, og eg fyrigykli ongum, at eg uppfinni hann. Hetta er ikki eins og ein banki ella telefonfelag, har tú kanst skapa eina ímynd. Samleikin er landið, fólkið, mentanin og søgan. Mín uppgáva er at eyðmerkja hetta og krystalisera tað, fáa tað at virka. Tað er tí eg nevni tað kappingarsamleika, sigur Simon Anholt.

Hann sigur, at tað er undarligt, sum hollendarar hata at verða settir í samband við tulipanir, vindmyllur og tuflur, tí tað ger landið lættisoppakent, meta teir.

- Sjálvur haldi eg, at tað er eitt hepni fyri landið at hava hesi symbolini, tí tað merkir, at tey longu eru í samskifti við alheimin. Tey kunnu siga við øll fólk í heiminum, at »eg komi haðani vit hava tulipanir og vindmyllur«, og øll vita beinanvegin, at talan er um Holland, sigur Simon Anholt.

Tá fólk longu vita tað, er lætt at samskifta og greiða fólki frá onkrum nýggjum um landið.

- Við Føroyum er øðrvísi, har er einki samskifti. Um eg sigi við fólk »tú veit, oyggjalandið í Norðuratlantshavi, ið hevur eitthvørt við Danmark at gera«, standa fólk sum kánus, og vit hava einki samskifti, og tí er tað nógv truplari, sigur Simon Anholt.

## Lætt at branda fyritøkur

Hann sigur, at tað er munur á at branda eitt land í mun til at branda eina fyritøku.

- Man kann siga, at tað eru fleiri ólíkheitir enn líkheitir. Tú kanst skapa eitt brand fyri eina fyritøku. Fyrst og fremst er ein fyritøka ikki eitt demokrati, ein fyritøka er eitt slag av einaveldi, og har er ein forstjóri, ið er at meta sum ein einaveldisharri, og hann sigur »hetta er mín visjón, hetta er mítt brand, og líkar tær tað ikki, verður tú koyrdur«, og undir slíkum umstøðum er lutfalsliga lætt at branda, sigur Simon Anholt.

Framkomin lond eru demokratiir, og tey arbeiða als ikki á tann hátt.

- Tað er ikki av tilvild, at lond sum Dubai og Singapore eru stýrd á tann hátt, tí tey eru eins og fyritøkur, og tá er lættari at branda, tí øll gera, sum tað verður sagt. Tað er tað fyrsta. Tað næsta er, at talan er um tvey púra ymisk ting. Fyritøkur eru einfaldar. Coke refreshes. Persil makes white. Carlsberg – probably the best lager in the World. Tað er lætt at branda. Lond er beint mótsatt, sigur Simon Anholt.

Hann sigur, at lond er torskild, kaotisk og mótsigandi, og tað er eisini tað, ið ger tey áhugaverd. Og tað ger tað ógvuliga trupult. Eitt annað er, at við einari vøru hevur tú okkurt at selja, lond hava einki at selja.

- Og tað er ein trupulleiki. Lýsingarherferðir eru fínar, um tú selur ferðavinnu, men um tú roynir at broyta umdømið, eru tað burturspiltir pengar, sigur Simon Anholt.

## Ævig tilgongd

Arbeiðið hjá Simon Anholt fyri føroyska uttanríkismálaráðið er um at vera av.

- Eg havi verið her 4-5 ferðir og havt eina rúgvu av samrøðum við eina rúgvu av fólki um alt landið, og vit hava ment eina ætlan. Næsta stigið verður nú at savna alt saman í einari frágreiðing, har eg geri nøkur heilt nágreinilig uppskot um, hvat tit eiga at gera. Men tað er ikki endin á tilgongdini, tað er byrjanin, so nú er tað upp til tykkum, og eg fari at mæla til struktturir og bólkar, sum skulu leiða tilgongdina frá nú av. Og hetta er byrjanin til eina tilgongd, sum varar í allar ævir, sigur Simon Anholt.

Hann sigur, at skapa eitt umdømi er sum at fylla eitt baðikar, tá onkur hevur tikið proppin.

- So skjótt tit hava fingið eina søgu í eitt blað, hava fólk gloymt hana, og tit mugu finna upp á eina nýggja, og so eina nýggja, og so eina nýggja, umaftur og umaftur. Fyri at koma hartil, at tú kanst steðga einari kvinnu á gøtuni í Kanada ella einum manni í Indonesia og spyrja, hvat tey halda um deiliga landið í Norðuratlantshavi, og tey siga áh, ja, Føroyar... Tað tekur 20 ár, sigur Simon Anholt.

Hann fer av landinum aftur í morgin, men innan tað hava fólk høvi at hoyra ein fyrilestur frá heimsins leiðandi serfrøðingi í kappingarsamleika. Í kvøld klokkan 19.30 fer Simon Anholt at halda fyrilestur í Miðlahúsinum, og øll eru sjálvandi hjartaliga vælkomin.